# TILTØK

**Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark**
Vesterbrogade 17A
1620 København V
Tlf. 33239980
Fax: 33239234
Teldupostur:
fo.raadgivning@get2net.dk
Hjálp og vegleiðing í sosialum, persónligum og lestrarligum spurningum. Opið er: Mánadag, týsdag og hósdag kl. 11.30-15.30, mikudag kl. 14-18, fríggjadag stongt.

**Føroyingafelagið í Aalborg**
Lille kongens gade 10B,
tlf. 98 13 63 30
email: alaborg@alaborg.dk
Álaborg er opið soleiðis:
Fríggjadag 17.00-19.00 og
Leygarkvøld 23.00-03.00.
Álakórið venur mikukvøld kl. 19.30
Annars verða tiltøk hjá felagnum lýst í Túnatos og á heimasíðuni www.alaborg.dk

**Føroyahúsið í Keypmannahavn**
Vesterbrogade 17A
1620 København V
Telefonupplýsing: 33231586
Dagliga telefonin: 33231587
Fax 33231588
E-mail addressa:
postur@faroehouse.dk
Heimasíðan:
www.faroehouse.dk
Á heimasíðuni er skráin, smátíðindi, feløgini og links víða um.
Kaffistovan er opin má.- frí. kl. 14 - 19
Bókasavnið um somu tíð.
Føroyskur døgverðamatur, fløgur, bøkur og pløgg fáast til keyps.
Vilt tú leiga ella skipa fyri tiltaki í húsinum, vendir tú tær til leiðaran.

**Føroyingafelagið í Esbjerg**
Danmarksgade 25,
6700 Esbjerg, tlf. 75132747
Opið hvørt mánakvøld kl. 19–22.00, har tú ert vælkomin at lesa bløðini, spæla kort og keypa tær ein kaffimunn.

**Føroyingafelagið í Århus**
Vestergade 48D
8000 Århus C
Tel. 86 18 06 04
Teldupostur:
aaarstova@hotmail.com
Café'in er opin mánadag til hósdag kl. 16-18 og leygarkvøldscafé kl. 22-03.
Reglulig tiltøk: Sunnudagsskúli annanhvønn sunnudag (líka vikur) kl. 14.30.
Bókasavn: Føroyskar bøkur kunnu lánast í Áarstovu mánadag-hósdag kl. 16.00-18.00.
MFS-stovan hevur opið hvønn mikudag kl. 16.00-18.00.
Kassameistari er at hitta hvønn mikudag kl. 16.00-18.00.
Flogbóltur er í Frydenlundskúlanum fríggjadag kl. 16.00-18.00. Badminton í Frydenlundskúlanum sunnudag kl. 16.00-18.00. Innandura fótbóltur í Hasselagerhøllini fríggjadag kl. 21.00-23.00.

**Føroyingafelagið við fjørðin**
Jægerspris. Vit hava ymisk tiltøk nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið, ella lokalt, so ring til Fríði tlf. 47317438 Gudni tlf. 47387748.

**Føroyingafelagið í Reykjavík**
Elin S. Wang,
Melabraut 8,
170 Seltjarnarnes, Ísland
Tlf. +354 5522368
E-mail: forrek@visir.is

**Føroyingar í Noregi**
E-mail:foroyar@norden.no
Heimasíða: http://www.norden.no/foroyar
Norsk-Færøysk Lag skipar javnan fyri tiltøkum fyri føroyingum og fólki við tilknýti til Føroyar. Tiltøkini verða hildin í Oslo, og nærri upplýsingar um tíð og stað fáast við at venda sær til felagið á tlf. +4722674829.

**Føroyingafelagið Vesturskin, Bergen**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Nærri upplýsingar við at venda sær til Elsebeth Reines, tlf. 55229049.

**Føroyingafelagið í Svøríki**
Vit hava tiltøk nakrar ferðir um árið. Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Annu Westfahl á tlf. +46176269536 ella Innu Törnroos á tlf. +468853570.

**Evangeliska Røddin, Odense**
Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

**Føroyska sendingin »v/ Betesdabrunnin«**
er at hoyra á FM 92,2 MHZ miðbýurin, FM 106,5 MHZ Aalborg suður, og FM 107,4 Aalborg norður, hvønn leygardag kl. 10 og verður endursend sunnukv. kl. 20.30.

**Malta, Hirtshals**
Sunnudag: Kl. 11: Breyðbróting. Kl. 18: Evangeliskur fundur. Mikukvøld kl. 20: Bønar- og uppbyggingarmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møti. Eftir fundirnar bjóða vit ein drekkamunn.

**Kristnastova**
Birmavej 36, København S,
tlf. 32551809 fax. 32586149
e-mail:
kristnastova@get2net.dk
Kristiligur fundur er hvørt fríggjakvøld kl. 20. Møti við breyðbróting er hvønn sunnumorgun kl. 11. Sunnudagsskúli er samstundis. Bussarnir 5, 9, 12, 13, 37, 38 steðga nærhendis.

**Før. gudstænasturnar í Samuelskirkjuni**
Thorsgade 65, 2200 København NV, eru hvønn 1. og 3. sunnudag í mánaðinum kl. 14. (Kirkjan er skamt frá Nørrebros Runddel). Presturin er at hitta á tlf. 38796146.

**Føroyskt møti í Álborg**
Føroysk møti eru fyrsta leygardag í hvørjum mánaði kl. 19 í hølunum hjá Bethania kirkjuni á Dag Hammerskjølds Gade 2. Drekkamuður er aftaná, øll eru hjartaliga vælkomin. Tit vælkomin at ringja til Annfinn Hjelm, tlf. 29725733.

**Føroyska nærvarpið í Esbjerg**
Føroyska sendingin »v/Betesdabrunnin« er at hoyra á FM 93,5 MHZ hvønn leygardag kl. 11 og verður endursend kl. 16.

# Er tað tær vit leita eftir?

Vinnumálastýrið sóknast eftir einum fólki til journalleiðarastarvið í stýrinum. Starvið verður sett undir Aðalskrivstovuni. Umframt aðalskrivstovuna fevnir Vinnumálastýrið um 3 deildir fyri ávikavist vinnu-, samskiftis- og veterinermál, og hevur stýrið sum høvuðsuppgávu at standa fyri at umsita vinnu-, samskiftis- og veterinermál hjá landsstýrinum. Vinnumálastýrið umsitur málsøki í m.a. ídnaði, handli, landbúnaði, aling, mati og umhvørvi, arbeiðsmarknaði, samskifti, samferðslu, herímillum fyrireiking og eftirlit við lógum, kunngerðum og reglugerðum.

**Tín førleiki:**
- skrivstovuútbúgving ella líknandi
- dugir væl føroyskt og danskt umframt kunnleika til enskt
- kunnleika til EDV á brúkarastigi
- góð samstarvsevni

**Tínar uppgávur:**
- at journalisera og avgreiða post
- ymiskar skrivarauppgávur fyri fulltrúar, deildarstjórar og aðalstjóra
- aðrar skrivstovuuppgávur

**Vit bjóða tær:**
- eitt spennandi og læruríkt starv, sum tú sjálv/ur ert uppi í at skapa, viðhvørt strævið, men samstundis sera áhugavert og avbjóðandi við góðum skeið- og eftirútbúgvingarmøguleikum.

**Løn- og setanartreytir**
Starvið er lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið. Setanarøkið fevnir um Vinnumálastýrið og stovnar undir tí umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalstýri.

**Umsóknir**
Hevur hetta tín áhuga, er tú vælkomin at senda eina umsókn við prógvum, viðmælum o.ø. til:

**Vinnumálastýrið**
**Postboks 377**
**Tórshavn**

innan 1. mai 2002.

Upplýsingar um starvið fært tú frá Ara Johanneson, deildarstjóra í Vinnumálastýrinum, á tel 35 60 60.

FØROYA LANDSSTÝRI

team85

VINNUMÁLASTÝRIÐ


R O V E R 75

Nýggja ella brúkta bilin keypa vit sjálvandi frá:
Pf. D.B.Bilar
Jónas Broncksgøta 15
Tlf. 310 · 600

www.sosialurin.fo

Brandt Blomberg
Hvítvørur til føroyska húsarhaldið
6 kg turr klæðir
600-1600 snúningar


Nú 5.595,-
pf Klement Petersen
Høgaból • 600 Saltangará • tel. 447560 • fax 448460



STEMPIL OG SKRÚVU KOMPRESSARIR
Stationerir og transportablir størri samt smærri
Fáast í flestum støddum til øll endamál verkstøð. fiskavirkir, alibrúk, entreprenørar v.m.
Kaj Andreasen & Co
Heilsøla, smásøla og umboð - Tel. 315600 - Fax 318008

Øll hava eina góða síðu – pop.fo hevur 100
Pop.fo er ein fesk síða við tónleiki og undirhaldi, sum hevur fleiri túsund vitjandi um mánaðin
Fylg við hvat er heitt & feitt – vitja pop.fo




## FILMSTEIGURIN

# 40 Days and 40 Nights

»Fyri menn eru 40 minuttir ein evigheit«, staðfestir tann sexuta Mandy og kastar eygnabráið á fongin, tann neyðars Matt, sum hevur lovað sær avhaldni, ikki í 40 minuttir men í 40 dagar. Totalt avhaldni frá øllum, sum bara minnir um sex!

Alt byrjar, tá genta hansara, Nicole, droppar hann, tí hon vil finna sær annað beiti.

Fyrst roynir hann at lindra pínuna við eini rúgvu av sex, men tá tað ikki virkar, roynir hann við ongum sex. Als ongum. Tað er ein ov stór freisting fyri vinirnar á kantórinum, sum beinanvegin seta í gongd eitt veddimál um, hvussu leingi hann heldur sítt cølibat. Privata lyfti hansara verður alment kent, ein og hvør – m. a. gjøgnum internetið – fara at vísa áhuga fyri datoini fyri syndafall hansara. Og tað skortar ikki upp á freistingar og forstáiligar starvsfelagar við pornobløðum – serliga ikki tann dagin, tey hava satsað sínar pengar.

Men Matt finnur eitt frælsi og nakað annað at hugsa um niðri á myntvaskarínum. Í øllum førum til Erica kemur inn við sínum vaskitoyið…





# Asterix & Obelix 2
## Missión Kleopatra

Meðan alt andar frið og ró í lítla gallarabýnum, stendur illa til í Egyptalandi. Rómverjarnir hava hertikið landi, og Kleopatra hevur mist hjartað sítt til Julius Cesar. Tá hann argar hana við, at egyptiska fólkið er so ódugnaligt, verður hon firtin og skjýtur upp eitt veddimál: Um hon innan tríggjar mánaðir megnar at reisa eitt slott mitt í oyðimørkini, skal hann alment viðganga, at egyptar er størsta fólkaslagið í heiminum.

Til at gera slottið setir hon Linealis ístarv, hann er ein ungur arkitektur.

Ólukkuligur um hesa truplu uppgávu, sær hann bert ein møguleika: At fara til Gallia og biðja Miraculix um hjálp. Skjótt er gamli gandakallurin, Asterix, Obelix og Idéfelix á veg móti Egyptalandi. Men her bíða forðingarnar – tann egyptiski herurin, ein óndur og forsmáddur arkitektur og ikki minst krokodillurnar…


HAVNAR BIO
Tlf. 31 19 56




Frumsýning

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Fríggjadagin | 19.04. | kl. 21$^{30}$ | Fríggjadagin | 19.04. | kl. 23$^{45}$ |
| Leygardagin | 20.04. | kl. 21$^{30}$ | Leygardagin | 20.04. | kl. 23$^{45}$ |
| Sunnudagin | 21.04. | kl. 20$^{45}$ | Sunnudagin | 21.04. | kl. 23$^{00}$ |

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu




Frumsýning

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Fríggjadagin | 19.04. | kl. 16$^{30}$ | Fríggjadagin | 19.04. | kl. 19$^{00}$ |
| Leygardagin | 20.04. | kl. 16$^{30}$ | Leygardagin | 20.04. | kl. 19$^{00}$ |
| Sunnudagin | 21.04. | kl. 15$^{45}$ | Sunnudagin | 21.04. | kl. 18$^{15}$ |




| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Fríggjadagin | 19.04. | kl. 20$^{45}$ | Leygardagin | 20.04. | kl. 20$^{45}$ |
| Sunnudagin | 21.04. | kl. 20$^{00}$ | | | |




| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Fríggjadagin | 19.04. | kl. 23$^{15}$ | Leygardagin | 20.04. | kl. 23$^{15}$ |
| Sunnudagin | 21.04. | kl. 22$^{30}$ | | | |




| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Fríggjadagin | 19.04. | kl. 18$^{00}$ | Leygardagin | 20.04. | kl. 18$^{00}$ |
| Sunnudagin | 21.04. | kl. 17$^{30}$ | *– Seinasta sýning* | | |